


# Nýggj oljuframleiðsla eystan fyri markið í ár

**Jan Müller**

28.02.2014 - 21:31

Oljan.fo

Í seinasta ársfjórðingi í hesum árinum fer ein nýggj oljuleið eystan fyri føroyska markið undir framleiðslu. Tað er Solan keldan, sum liggur sunnan fyri stóru oljukeldurnar, Foinaven og Schiehallion. Tað er Premier Oil, sum er fyristøðufelag. Í løtuni verður seinasta hond løgd á at gera oljupallin kláran til framleiðsluna. Roknað verður við eini framleiðslu uppá 24.000 tunnur um dagin í byrjanini men seinni verður hon 40.000 tunnur um dagin.

Premier Oil hevur júst staðið fyri eini verkætlan at bora fýra avmarkingarbrunnar í økinum.